# Vilja hava at vita hvar lønarlagið í Føroyum skal vera í framtíðini

**– Nú samráðingar um nýggjan sáttmála byrja fyrsta dagin, vil Starvsmannafelagið hava at vita frá Fíggjarmálastýrinum, hvar tað metir, at lønarlagið í Føroyum skal vera í framtíðini**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Hetta verður eitt strævið vár hjá formanninum í Starvsmannafelagnum, tí hesuferð ganga allir sáttmálarnir út - og teir eru nógvir*

– Nú er tað neyðugt at vit fáa at vita frá landsstýrinum, hvussu tað heldur, at lønarlagið í Føroyum skal vera í framtíðini.

Hetta er eitt av krøvunum, sum Starvsmannafelagið hevur sett Fíggjarmálastýrinum hjá Landsstýrinum, nú partarnir fyrsta dagin fara undir sáttmálasamráðingar.

Sáttmálin ímillum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið gongur út 1. mars og ætlanin er at samráðingar um nýggjan sáttmála skulu byrja fyrsta dagin.

Og í farnu viku læt Starvsmannafelagið Fíggjarmálastýrið fáa krøvini, sum felagið setir til tann nýggja sáttmálan.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, sigur, at hann vil ikki greiða frá út í æsir, hvørji krøvini eru, fyrrenn Fíggjarmálastýrið hevur havt høvið til at kanna tey.

Men hann sigur, at ætlanin er at greiða almenninginum frá krøvunum seinni.

Hann væntar, at fyrsti fundurin verður fyrsta dagin og tá verða krøvini løgd fram. Eftir tað framløguna, verður greitt nærri frá krøvunum.

## Gera støðuna upp

Tó sigur Gunnleivur Dalsgarð, at krøvini eru sett eitt sindur øðrvísi upp í ár, enn vanligt hevur verið.

–Vit hava ikki ásett nakað ávíst prosent á, fyri, hvussu stóra lønarhækking, vit krevja.

– Hinvegin hava vit kanna lønarlagið bæði í Føroyum og í øðrum londum í einum 10 ára skeiði. Síðani hava vit samanborið gongdina í lønarlagnum í Føroyum og aðrastaðni.

– Og tað er púra greitt, at í øðrum londum eru lønirnar í hesum 10 ára skeiðnum hækkaðar nógv meiri enn hjá okkum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at sjálvandi hevur Starvsmannafelagið eina hugmynd av, hvussu lønarlagið skal vera. Og í fyrsta umfarið er tað útspælið.

Annars sigur hann, at uppleggið til samráðingar er ógvuliga fjølbroytt og fevnir um nógvar tættir í samráðingunum.

Hann sigur eisini, at fleiri feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum fara at samráðast í felag um ávís mál.

Eitt av hesum málum er eru tey 0,8 prosentini, sum feløgini hava goldið í ein barnsburðargrunn.

– Kemur landsstýrið nú við einum nýggjum barnsburðargrunni, soleiðis, sum tað er fráboðað, er kravið frá feløgunum, at tey 0,8 prosentini verða borðin aftur, áðrenn tosað verður um aðrar lønarhækkingar yvirhøvur.

Annars dugir Gunnleivur Dalsgarð illa at meta um, hvussu samráðingarnar fara at vera.

Men hann vísir á ,at Starvsmannafelagið setir sær ikki sum mál at stýra ímóti einum verkfalli.

– Vit eru altíð bjartskygd og vit leggja altíð dent á at finna semjur, tá ið vit samráðast.

Í øllum førum kann roknast ið einum sera strævnum samráðingarvári hjá Starvsmannafelagnum, tí allir sáttmálarnir hjá felagnum ganga út nú í vár- og teir eru nógvir. Umframt at hava sáttmála við Fíggjarmálastýrið, hevur Starvsmannafelagið eisini sáttmála við SEV, Føroya Tele, umframt við fleiri kommunur.

# Hovbingar lítlan áhuga í at brúka sín rætt

**Ikki meiri enn gott og væl annarhvør hovbingur var á vali, nú umval var til bygdaráðið mikudagin. Hovbingar hava yvirhøvur lítlan áhuga fyri kommunupolitikki**

BYGDARÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*



*Tað vóru fáir hovbingar á vali, nú umval var til bygdaráðið týsdagin. Her er tað Ásbjørn Berg, formaður í fráfarandi bygdaráðnum, sum greiðir atkvøðu. Við pultin situr Ditlev Hammer, sum er formaður í valstýrinum og fremst á myndini er Karin Johansen, sum eisini er í valstýrinum.*

Hovbingar tíma ikki serliga væl at fáast við kommunalpolitikk.

Hetta kom so týðiliga sum ongantíð fyrr til sjóndar týsdagin, tá ið umval var til bygdaráðið.

Upprunaliga bygdaráðsvalið varð lýst ógyldugt av tí at tað vísti seg seinni, at eitt av valevnunum var íslendskur ríkisborgari og hevði tí ikki valbæri í Føroyum.

Tað var Margrét Jóhannsdóttir, sum á valinum 21. november fekk seks atkvøður og fekk sæti í bygdaráðnum í lutakasti við Dagfríð Hovgaard, sum eisini fekk seks atvkøður.

Av tí sama gjørdi kommunala eftirlitið av, at umval skuldi vera í Hovi týsdagin, 6. februar. Á valinum hesuferð høvdu bara tey somu valrætt, sum høvdu valrætt 21. november.

Tey vóru 94 í tali, men síðani tann vallistin varð gjørdur, eru trý fólk deyð, so týsdagin høvdu 91 fólk valrætt.

## Lítil áhugi

Hovbingar hava yvirhøvur lítlan áhuga fyri kommunalpolitikki. Oftani er bara tann eini listin uppstillaður og mangan hava tey verið noydd at seta fólk á listan, uttan at spyrja tey eftir, um tey vilja verða uppstillað, tí tað hevur heldur ikki verið gravgangur eftir at sleppa á listan.

Tað hava tey kunnað gjørt, tí tað er ein borgaraskylda at lata seg stilla upp til kommunuval.

Valið hesuferð var onki undantak.

Á valinum 21. november var bara ein listi. Og á valinum nú týsdagin var bara hesin sami listin uppstillaður, einasti munurin var, at Margrét Jóhannsdóttir, sum ikki hevði valbæri, var tikin av listanum. Sostatt høvdu hovbingar sjey valevni at velja ímillum hesuferð, ístaðin fyri átta á valinum 21. november.

Á valinum 21, november greiddu 65 veljarar atkvøðu av teimum 94, sum høvdu valrætt. Tað er ikki meiri enn 69,1%, sum man vera millum lægstu valluttøkur í landinum.

Á valinum hesuferð var luttøkan enn minni. Óivað hevur kavaveður og ringt geingi gjørt sítt til, at so fá vóru á vali. Týsdagin vóru nevniliga bara 57 fólk á vali av teimumn 91, sum høvdu vælrætt. Tað eru 62,6% av veljarunum.

Leingi sá tað út til, at luttøkan fór at verða enn lægri, tí á miðdegi týsdagin høvdu bara sjey fólk valt, afturímóti 13 fólkum á miðdegi á valinum 21. november. Klokkan 16. týsdagin høvdu bara 15 fólk valt, og tað er eisini nógv minni enn fyrru ferð.

Í valstýrinum duga tey ikki at siga, hvussu tað ber til, at hovbingar hava so lítlan áhuga fyri kommunalpolitikki.

Men í valstýrinum høvdu tey lagt upp fyri, at at tað bleiv langt ímillum veljararnar. Tær báðar konurnar í valstýrinum høvdu stokkar við og formaðurin stytti sær stundir við onrkum av teimum mongu bókunum, sum eru í skúlanum, har valið var.

## Tey somu

Annars broytti valið týsdagin ikki nógv um bygdaráðið. Einasta broyting var, at Dagfríð Hovgaard kom í bygdaráðið fyri Margrét Jóhannsdóttir. Margrét var júst vald 21. november í lutakasti við Dagfríð.

Annars eru bygdaráðslimirnir í Hovi nú hesi: Fyrst vald er Emma Petersen við 18 atkvøðum, síðani fekk Jákup Petur Joensen 14 atkvøður, Alexius Midjord fekk 8 atkvøður, Dagfríð Hovgaard fekk seks atkvøður. Fimti bygdaráðslimurin í Hovi er Delmar Tausen, sum fekk 5 atkvøður

Hann varð valdur í lutakasti við Sonnu Elinu Hovsgarð, sum eisini fekk 5 atkvøður, men sum sostatt ikki varð vald. Niels Jespersen fekk eina atkvøðu og varð sostatt heldur ikki valdur.



# Eiði vil hava landsins reinastu havn

**Á Eiði ætla tey rættiliga at liva upp til heitið sum reinasta bygd í landinum. Nú vilja tey eisini hava reinastu havn í landinum. Á almennum bygdarráðsfundi mánakvøldið varð samtykt, at einki kloakkfrárensl yvirhøvur skal leiðast út í havnina**



*Eiðis Kommuna hevur samtykt, at einki kloakkfrárensl yvirhøvur skal latast út í havnina*

KOMMUNAL-POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Eingin kloakk yvirhøvur eigur at renna út í havnina á Eiði, samtykti bygdarráðið á almennum bygdarráðsfundi mánakvøldið.

Fyrsti almenni bygdarráðsfundurin á Eiði, sum hildin varð eftir nýggju kommunulógini, gjørdi av, at einki frárensl skal latast út innan fyri grótkøstini, sum gyrða havnina á Eiði.

Sum er fara eini tvey slík enn í havnina, men tey verða fyrsta dagin leidd í aðra veiting, sum løgd er út á streymasjógv uttan fyri stóra grótkastið vestan fyri gomlu atløgubryggjuna.

Talan er um at gera ein brunn eystan fyri smiðjuna hjá Hydro-Tech, sum skal savnað tað kloakkvatnið, sum kemur frá ídnaðarøkinum og økinum har á leið. Tað verður síðan pumpað niðan í leiðingina, sum longu er løgd út um grótkastið.

Tá tað er liðugt, fer hvør einasti dropi av kloakkvatni av Eiði beinleiðis út á streymasjógv. Fyri fleiri árum síðan varð leiðingin frá niðara parti av bygdini lagdur gjøgnum rør oman gjøgnum vatnið, nevnt Niðri á Vatni, oman á Møl og til havs tann vegin. Seinni er so uttari partur veittur út um Grótkastið. Har var millum annað frárenslið frá Norðís við. Og tá nú hetta seinasta verður liðugt rættilga skjótt, verður havnin gullrein.

Hetta arbeiðið, sum bygdarráðið samtykti at gera nú, fer at kosta umleið 100.000,- krónur, varð upplýst á fundinum mánakvøldið.

Onnur mál, sum bygdarráðið viðgjørdi hetta kvøldið, vóru liðugtgerð av bátadráttinum innan fyri sunnara grótkastið, og liðugtgerð av ítróttarhúsinum við fótbóltsvøllin Niðri á Møl.

Kommunan ger ein drátt at taka størri bátar upp eftir. Hann verður gjørdur í krókinum innast við lítla brimgarðin. Innan fyri flótibrúnna.

Sagt varð á bygdarráðsfundinum mánakvøldið, at eitt nú Hydro-Tech hevði gjørt vart við, at teir vænta at fáa nógv brúk fyri honum, tí teir skulu hava fleiri bátar til eftirlit á smiðjuni.

Hydro-Tech hevur millum annað smíðað fleiri tvíkiljur til alivinnuna. Men eisini aðrir bátar eru vælkomnir í smiðuørindum, skilst.

Eisini var ein umsókn frá Eiðis Bóltfelag um fíggjarligan stuðul til at gera ítróttarhúsið við fótbóltsvøllin liðugt.

Arbeiðið, sum gerast skal, er at bjálva og klæða húsið. Umframt at ovara hæddin skal innrættast. Samlaði kostnaðurin fyri hetta arbeiðið varð mettur til umleið 400.000,- krónur.

Bygdarráðið samtykti at stuðla bóltfelagnum við einum parti av kostnaðinum.

Men eisini gamla EB húsið heimi í bygdini verður umvælt í hesum døgum. Nakað væl er gjørt, men okkurt er eftir enn at gera, varð sagt í skrivi frá Eiðis Bóltfelag, sum lisið varð upp á almenna bygdarráðsfundinum. Millum annað varð nevnt, at húsið er í trimum hæddum, og ásannað varð, at torført er hjá rørslubrekaðum at brúka húsið.

Eisini til ta ætlanina var bygdarráðið sinnað at veita ein ávísan stuðul.


Móttøka

Vit bjóða øllum okkara viðskiftafólki og áhugaðum annars, til móttøku í morgin, fríggjadagin 9. februar frá kl: 14:00, í hølum okkara.

VOLVO RENAULT

VR BILAR

Sp/f VR-Bilar · Hoyvíksvegur · Postboks 3130 · FO-110 Tórshavn · Tel +298 32 21 10 · Fax +298 32 21 11